# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tørvur á tjóðskaparligari semju

Heimastýrisskipanin hevur 60 ár á baki og enn sum áður er skipanin orsøk til umrøðu og ósemjur í fólkinum. Enn sum áður trætast løgfrøðingar og stjórnmálafrøðingar um heimastýrislógina. Heimastýrislógin hevur sínar vinir og sínar fíggindar. Til vinirnar hoyra Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Javnaðarflokkurin. Í roynd og veru var eingin av hesum flokkum í síni tíð fegin um lógina. Sambandsflokkurin helt lógina fara ov langt og hinir báðir mettu hana røkka ov stutt í spurninginum um føroyskt sjálvstýri. Fólkaflokkurin helt sum vera man lógina geva alt ov lítið sjálvræði og óneyðugt er at nevna, hví Tjóðveldisflokkurin allar dagar hevur verið hart ímóti lógini og tí politisku skipan, ið er avleidd av lógini. Allir hesir flokkar og eisini nýggir flokkar, ið eru komnir til, hava tó arbeitt og virkað undir heimastýrisskipani og staðfestast kann, at allir hava roynt meira ella minni av fullum huga at menna føroyskt politiskt sjálvræði innan teir karmar henda lóg setir skipanini. Tað má eisini ásannast, at uttan mun til, hvat stórir partar av fólkinum halda um lógina, eru Føroyar hesi seksti árini mentar til eitt av heimsins mest framkomnu samfeløgum. Henda menning var ikki, um vit ikki høvdu tað sjálvræði, ið kom við heimastýrislógini. Hetta, at løgting og landsstýri fingu ræðið á skatta- og avgjaldsmálum, kommunumálum, vinnumálum, útbúgving, mentan og gransking, fólkakirkju og ræði á eini vaksandi røð av málsøkjum, ið meira ella minni liggja á lógarinnar gráa øki hevur sjávsagt havt avgerandi týdning fyri føroyska menning og samleika.

Nú er stund at ásanna, at tíðin er farin frá heimastýrislógini og tí støðu, ið hon gevur Føroyum í ríkisfelagsskapinum. Føroyingar eiga nú í góðari semju at finna fram til eina aðra og betri hóskandi skipan. Hvørt henda skipan skal enda við loysing ella einari nýggjari og meira frælsari støðu í einum broyttum og nútímansgjørdum ríkisfelagsskapi, má avklárast innan alt ov langa tíð. Vit hava sum tjóð og fólk ikki ráð at klandrast um sjálvstýri og samband í allar ævir. Hetta er alt ov orkukrevjandi og spjaðandi. Tað liggur tí ein sera stór ábyrgd á øllum flokkum. Tíðin við fullveldislandsstýrinum vísti, at tað er ikki breið semja í fólkinum um loysing. Hinvegin er eingin nøgdur við verandi støðu, ið ikki hóskar til okkara tíð og okkara samfelagsmenning. Síggja vit burtur frá royndunum hjá undanfarnu samgongu at skapa eina breiða tjóðskaparliga semju, hevur sjálvstýristilgongdin higartil ikki verið nøktandi.. Nú mugu vit hava eitt breitt og sakligt fólksligt orðaskifti og í góðari tjóðskaparligari semju finna eina skipan, ið ein breiður meiriluti tekur ábyrgd av, tekur undir við og kennir seg tryggan við.

**Sosialurin**

## Einskiljing av Atlantic Airways – ein vanlukka!

RÓGVI ABSALONSEN
MA



Føroysku motorvegirnir til onnur lond hava seinastu árini tikið skap sum flogrutur til Íslands, Bretlands, Danmarkar og Noreg. Fyri okkum eru flogruturnar at samanbera við brúnna um Oyrasund ella motorvegin til Týsklands fyri danir, ella undirsjóvartunnilin undir Ermasund fyri bretar. Men í Føroyum er politiska prioriteringin av hesum alneyðugu "motorvegum" til útheimin, alt ov lág. Ávísir politikkarar vilja einskilja eitt felag, sum longu hevur monopol á einasta góða ferðamøguleika hjá útisetum og føroyingum her heima.

Í Sosialinum 31. mars verður Magni Arge siteraður fyri at siga, at "ferðasambandið og førleikin at ferðast er fyritreytin fyri trivnaði í framkomnu Føroyum." Men er prísurin á flogferðaseðlum ikki tengt at ferðasambandinum og førleikanum at ferðast? Eg eftirlýsi eina frágreiðing um, hvussu einskiljing ger fyritreytirnar fyri at ferðast betri, tá ið vit vita, at privat monopol er besta fyritreyt fyri hækkandi prísum.

Mangan havi eg tosað við útisetar í Danmark og í Bretlandi, sum siga seg ikki hava verið heima í fleiri ár av tí einfaldu orsøk, at tað er ov dýrt at ferðast til Føroya. Eisini havi eg møtt útlendingum, sum hava havt áhuga at ferðast hendavegin, men sum hava sett seg aftur orsakað av høga prísinum. Einskiljingin fer óivað at hava við sær, at prísir, sum longu eru alt ov høgir orsakað av ferðaavgjaldinum, fara at hækka enn meira. Hvat er politiskt hugsjónarliga grundgevingin fyri at leggja eitt eykagjald omaná longu dýru ferðaseðlarnar? Vilja vit tálma ferðing til og úr Føroyum? Ynskja vit at isolera okkum sjálvi frá umheiminum, bara so vit kunnu fáa nøkur skjót oyru afturat í landskassan? Eru vit veruliga so stuttskygd?

Seinastu árini hava vit megnað at betra um ferðasambandið við okkara egnu útoyggjar, men nær fer politiski myndugleikin at rakna við og viðganga, at vit eru ein útoyggj í altjóða høpi, og at besti møguleiki at hála okkum nærri hinum londunum í Evropa er at lækka prísin fyri at ferðast til og úr Føroyum?

Fyri nøkrum mánaðum síðani valdi National Geographic Føroyar til besta vistferðamannaland í heiminum. Eftir hetta varð nógv tos her heima um, hvussu vit skuldu fáa sum mest burturúr ferðavinnuni. Men tað potentiali, sum Føroyar hava á ferðavinnuøkinum, verður ikki rokkið, um prísurin at flúgva til Føroya er so høgur sum nú.

Eisini hevur nógv tos verið um, at vit skulu hava eitt altjóða universitet sett á stovn. Men sum øll vita, so er eitt universitet lítið vert uttan væl útbúgvið fólk, og hvussu ætla vit at fáa útlendskar akademikarar og lesandi hendan vegin, tá ið tey skulu gjalda so nógv fyri at ferðast?

Vit vita eisini, at nógvir føroyingar, sum leita sær uttanlands at lesa, koma ongantíð heim aftur at búseta seg. Eg skal ikki fara at gita, hvørjar orsøkirnar eru, men einskiljingin av Atlantic Airways (og harvið hækkaðir flogferðaseðlaprísir) fer ikki at hjálpa uppá henda trupulleika.

Marknaðarkreftir eru sjálvandi góðar í nógvum førum. Men í summum førum er tað meira búskaparliga skynsamt ikki at einskilja. Tak til dømis heilsuskipanina í USA og ta í Bretlandi. Sambært búskaparfrøðinginum Tim Harford hjá Financial Times er heilsuskipanin hjá USA væl dýrari og minni effektiv, hóast bretska skipanin er í almennum hondum og amerikanska skipanin er í privatum hondum.

Tað sum eg vil við døminum omanfyri, er at vísa á, at marknaðarkreftir ikki altíð eru góðar. Hví hava vit enn politikkarar í Føroyum, sum hava eina so ósvikaliga trúgv á marknaðarkreftir, og at einskiljingar altíð eru skilagóðar, óansæð hvørjum sambandi tað er í? Er tað ikki nokkso greitt, at fyri at fáa eitt meira dynamiskt samfelag, bæði sosialt og vinnuligt, so er tað skilabetri, at tað almenna roynir at halda ferðakostnaðinum hjá tí einstaka borgaranum niðri á einum støði, sum vit kunnu liva við?

Um vit ikki ynskja at vera við í altjóða samfelagnum, so er at halda fram við einskiljingini av Atlantic Airways. Men um vit ynskja dynamikk, og harvið búskaparligan framburð og sosiala menning, so má gongdin steðgast.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.